Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

# Hotel Hafnia formliga yvirtikið

**Í sambandi við ognar- og stjóraskifti á Hotel Hafnia varð bjóðað til almenna móttøku á hotellinum fríggjadagin 7. januar. Tað er P/F Hvarvið sum eigur hotellið, og nýggir stjórar eru Ása Johnsdóttir og Birna Gaard**

MÓTTØKA

*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Fremst á myndini eru nýggju stjórarnir, Ása Johnsdóttir og Birna Gaard, saman við nýggju og gomlu eigarunum av Hotel Hafnia. Nýggju nevndarlimirnir eru, f.v.: Osmund Justinussen, Per Sævik, Gunnar Justinussen, Ingibjørg Ólafsdóttir (stjóri á Hotel Island í Reykjavík), Tummas Justinussen, og Johan Djurhuus. Og gomlu eigararnir: Johan Restorff, Martin Restorff og M.C. Restorff*

Umleið 700 fólk vóru til móttøkuna fríggjadagin 7. januar 2005, tá Hotel Hafnia formliga varð yvirtikið av nýggju eigarunum. Tað er P/F Hvarvið sum í dag eigur hotellið.

Gomlu eigararnir Johan, M.C. og Martin Restorff nýttu høvið at takka øllum, bæði starvsfólkum og viðskiftafólkum fyri trúfesti og gott samstarv farnu árini.

Nýggju stjórarnir eru Ása Johnsdóttir og Birna Gaard.

Ása er 39 ára gomul. Hon hevur starvast á Hafnia síðan 1985, tey seinastu 10 árini sum leiðari av móttøkuni, og Birna er 32 ára gomul og útbúgvin Akademi Økonom frá hotelskúla í Keypmannahavn. Seinasta árið hevur hon hevur starvast sum konferencestjóri á Hafnia.

Tey sum hildu talu vóru: Johan Restorff, fyri gomlu eigararnar, Gunnar Justinussen fyri nýggju eigararnar, og Ása Johnsdóttir, stjóri á hotellinum

Hóast eingin av Restorff familjuni nú er eftir á Hotel Hafnia, verður hotellið rikið í sama anda sum higartil og starvsfólkini eru tey somu.



*Foreldrini hjá Ásu Johnsdóttir, John og Dagmar Johannesen og beiggin, Tróndur*



*Ein av grannunum, Birgit Kleist ríkisumboðsmaður, kom við blómum*



*Osmund Justinussen, eigari av Hotel Hafnia, og Jákup Sólstein, formaður í Føroya Reiðarafelag. Millum teir sæst Árni Jensen, skipari*



*Esther Kristiansen og Jeffri Johannesen frá Hotel Tórshavn*



*Sólbjørn Jacobsen, fyrrverandi telefonverksstjóri, og norðmaðurin Per Sævik, eigari og nevndarlimur í Hotel Hafnia*



*Fyrrverandi og núverandi eigarar av Hotel Hafnia, Johan Restorff og Osmund Justinussen*